# Komnir í gongd

**Føroyska landsliðið hevði sína venjing hóskvøldið, men enn hevur Allan Simonsen ongar ábendingar givið um, hvørjir teir ellivu verða, sum byrja inni leygardagin**

LANDSDYSTUR
*Álvur Haraldsen/ Jákup Mørk – Bled, Slovenia*

Tað er ikki ofta, at fólk gleðast um at vera arbeiðsleys, men í Slovenia tykjast tey flestu fegin um, at Jens Pauli Marstein ikki hevur nakað at gera í hesum døgum.

Tað er jú soleiðis, at er læknin hjá landsliðnum arbeiðsleysur, so er landsliðið væl fyri, og í so máta tykjast eingir trupulleikar at vera í landsliðsleguni hesaferð.

Sjálvandi er hetta ikki trygd fyri, at eingir skaðar fara at gera um seg, men danir siga vanliga, at ein góð byrjan er helvtin av arbeiðinum, og um so er, so sær støðan hjá føroyska liðnum ikki annað enn heilt góð út.

### Ongar ábendingar

Fyrrapartin hósdagin hevði landsliðið so sína fyrstu venjing. Allan Simonsen nýtti ikki høvdi til at royna nakað serligt sum so. Denturin varð heldur lagdur á, at leikararnir sluppu at røra seg eitt sindur. Fáa kensluna av grasi, og bara koma í gongd sum so.

Ofta plagar venjarin at býta í tveir partar, har tanð so væl kenda gula liðið er mest átøkt tí, sum fer at byrja inni í komandi dystinum.

Soleiðis er tó ikki hesaferð. Hósdagin spældu leikararnir ístaðin í partum, sum vórðu ásettir eftir aldri, soleiðis at teir ungu spældu móti teimum »gomlu«.

Tað er eisini greitt, at sjáldan hevur Allan Simonsen havt somikið nógv at hugsa um, sum hann hevur hesaferð. Ein nýggjur miðvøllur skal finnast, og spurningurin er, hvussu venjarin fer at gera hetta. Mest sannlíkt tykist vera, at Jens Kristian Hansen verður togaður niðan á miðjuna, meðan Øssur Hansen eisini verður drigin inn av vongverjanum. Hetta gevur so rúmd fyri einum nýggjum vinsta bakki, og ivaleyst verður hetta Heðin á Lakjuni ella Súni Olsen.

Um so er, at Jens Kristian verður fluttur niðan á miðjuna, merkir hetta so helst eisini, at talan aftur verður um tveir álopsleikarar. Áður hevur ivamálið annars verið, hvørt einsamalli áleyparin skal vera Christian Høgni Jacobsen ella Kurt Mørkøre, men um talan verður um tveir, so slepst í øllum førum undan hesum hugleiðingunum.



*Jens Pauli Marstein hevur ikki stórvegis at takast við enn, men hinvegin er hetta bara góð tíðindi fyri landsliðsleguna*

### Málverjin

Annars spurningur er so, hvør fer at byrja í føroyska málinum leygardagin.

Seinastu árini hevur Jákup Mikkelsen verið fyrsta valið framman fyri Jens Martin Knudsen, men tær báðar seinastu undankappingarnar hevur Allan Simonsen tó latið eykamálverjan fáa seinasta dystin. Soleiðis var í Grikkalandi í 1997, tá Jákup Mikkelsen slapp fram um Jens Martin, og støðan var júst hin øvugta í Prag fyri tveimum árum síðani.

Sum sagt hevur venjarin enn ikki givið nakrar ábendingar, men seinnapartin leygardagin vita vit helst betri í so máta.

## Friðarligt



*Tað er í lítla og friðarliga býnum, Bled, at føroyska landsliðslegan heldur til*

**Landsliðið býr í einum lítlum býi nærhendis slovenska høvuðsstaðnum**

*Álvur Haraldsen/ Jákup Mørk – Bled, Slovenia*

Hóast landsdysturin leygardagin skal spælast í slovenska høvuðsstaðnum, Ljubljana, so er tað ikki her, at føroyska landsliðið og umboðini fyri fjølmiðlarnar búleikast.

Ístaðin er tað í einum minni býi, Bled, at føroyska liðið heldur til. Hetta er ein býur, sum telur einar 11.000 íbúgvar, og er hetta soleiðis ein av teimum 118 kommununum í landinum.

Føroysku áskoðararnir, sum munnu vera úti við hálvt hundrað í tali, búgva hinvegin í Ljubljana, so tað er ikki nógv, sum hesir síggja til liðið fram til leygardagin.

### Gott veður

Veðurmenninir siga, at veðrið fer at verða av tí fagrasta hesar dagarnar, sum ferðalagið er í Slovenia.

Roknað verður við, at hitastigini verða eini 20 í tali, og hóast tað so av á koma nakrir dropar niður úr himmalhavinum, so man hetta neyvan fara at vera nakað, sum órógvar fyrireikingarnar stórvegis.



*Tað tykist sum um Allan Simonsen hevur meira enn vanligt at hugsa um á landsliðsferðini til Slovenia*



# KÍ setti Eysturríki upp á pláss



*Tað var bragd av KÍ-kvinnunum at vinna ímóti Landhause úr Eysturríki*

**Enn eina ferð stóð eitt eysturrískt lið sum kánus, meðan føroyingarnir fegnaðust um sigurin**

EUROPA CUP FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Søgan endurtekur seg, plagar at verða tikið til. Mikukvøldið vístu føroyameistararnir í kvinnufótbólti, at tað er nakað í hesum. KÍ vann 2–1 ímóti Landhause úr Eysturríki. Eingin hevði roknað við sigrinum. Jón Harald Poulsen, venjarin hjá KÍ, segði í blaðnum í síðstu viku, at KÍ fór við í hesa fyrstu Europa Cup kappingina fyri at læra. At tað skuldi eydnast at vinna nakað stig og nakran sigur tóktist ikki koma upp á spæl. Og eysturríkararnir vóru eftir dystin sum slignar á nevið. Tað sást á øllum brøgdum, at tær avgjørt ikki høvdu roknað við, at tær skuldu fáa nakra serliga mótstøðu frá KÍ kvinnunum.

At eysturríkska liðið ikki roknaði føroyska liðið fyri nakað serligt mótstøðulið er ófatuligt – í hvussu so er, tá sæð verður upp á hetta við føroyskum eygum. Fyri ellivu árum síðani – 12. september í 1990 – vann føroyska landsliðið í fyrsta EM undankappingardystinum 1–0 á Eysturríki. Sigurin í Landskrona verður framvegis roknaður at vera størsta senstatiónin nakrantíð í altjóða landsliðsfótbólti.

Mikukvøldið syrgdu kvinnurnar hjá KÍ fyri, at Eysturríki enn eina ferð fekk eina orduliga áminning um, at tá tað ræður um fótbólt, so er møguleiki fyri øllum.

### Framúr hugburður

Jón Harald Poulsen var, sum vera man, ovurfegin, tá vit fingu fatur á honum mikukvøldið. Tá var KÍ ferðalagið komið aftur á gistingarhúsið, sum tey siga er framúr gott.

– Eg má siga akkurát sum er. Hetta høvdu vit ikki roknað við, og tí sigur tað seg sjálvt, at vit eru ovurfegin. Vit løgdu varisliga fyri, og vit hildu okkum alla tíðina til verjukenda útgangsstøði. Spælskipanina kunnu vit kalla 3–6–1. Setningurin hjá okkum var at ovurfólka miðvøllin, so tær ikki skuldu fáa lætt spæl. Hetta eydnaðist til fulnar. Okkara vóru so grammar í 1. hálvleiki, sum eg ikki haldi meg hava sæð tær áður. Tær lógu tætt í mótstøðukvinnunum, sum ongantíð fingu frið at samanspæla og tískil vóru rættuliga stressaðar, greiðir KÍ venjarin frá úr finska høvuðsstaðnum Helsingfors.

Jón Harald Poulsen var fegin um, at hann hevði so nógv fólk á miðvøllinum. Kristina Eyðbjørnsdóttir og Ragnhild Aas arbeiddu sum hestar mitt á, Bára Skaale og Jensa Sirdal tettu væl í høgru og funnu væl hvørja aðra, tá KÍ hevði bóltin, og tað sama gjørdu Vivian Bjartalíð og Malena Josephsen í vinstru. Verjan var sera tøtt. Liðformaðurin, Ragna Andreasen, var góður stýrimaður, og Pauluarnar Sjóstein og Mikkelsen vóru góðir eftiransarar. Anna Müller Jacobsen, sum eftir at hava sitið á beinkinum í eitt nú steypafinaluni á ólavsøku, hevði fingið møguleikan í málinum, stóð seg væl.

### Fingu løn beinanvegin

Pressspælið og ágrýtnið bóru løn við sær beinanvegin, og tað hevði sjálvandi alstóran týdning fyri KÍ.

Í 4. minutti skoraði Rannvá Andreasen, sum í útgangsstøðuni var einsamøll á toppinum, og í 16. minuttinum økti hon til 2–0. Eysturríkararnir vóru púra skelkaðar, og tað hevði avgjørt einki forgjørt verið í tí, um KÍ hevði skorað eitt mál afturat. Vivian Bjartalíð, sum saman við Malenu Josephsen mannaði miðvøllin í vinstru, sendi úr 25 metrum eitt fínt langskot ímóti málinum. Bólturin tók innaru síðuna av stólpanum og sprakk aftur í spæl.

### Løgdu seg longri afturi

Jón Harald Poulsen sigur, at í 2. hálvleiki legði KÍ størri dent á verjupartin.

– Í steðginum sást væl, at okkara spælarar vóru rættuliga móðar. Tað var ikki so undarligt, tí tær høvdu drivið so ómetaliga nógv á. Men hóast vit vardu, og hinar høvdu bóltin nógv, so vóru tær sjáldan vandamiklar. Tað mesta av spælinum var ímillum miðlinjuna og brotsteigin hjá okkum, men vandamiklu støðurnar vóru heilt fáar. Tá 65 minuttir vóru farnir, fingu tær eitt mál. Tað kom eftir, at okkara høvdu kiksað í brotsteiginum. Men aftaná hetta vóru tær ongantíð serliga tætt við at javna, heldur venjarin.

Tá dómarin brísklaði fyri síðstu ferð, var fagnaðurin á teimum bláu øgiligur. Og tað var ikki so undarligt, tí tær høvdu skrivað søgu. 1. deildarliðið hjá KÍ á mannfólkasíðuni skrivaði søgu, tá teir í 1992 luttóku í Europa Cup fyri meistarar, men teir taptu báðar dystirnar ímóti Skonto Riga. Mikukvøldið skrivaðu KÍ kvinnurnar søgu, tá tær sum tær fyrstu í Føroyum tóku lut í Europa Cup – hetta er fyrsta Europa Cup kappingin yvirhøvur hjá kvinnunum – og tað var ikki eiti á søga, sum KÍ skrivaði. Tær tóku bæði seg sjálvar og øll onnur á bóli, tá tær vunnu 2–1 á meistaraliðnum úr Eysturríki. Orkan, sum hevur verið nýtt til venjing og innsavnan av pengum, hevur ikki verið nýtt til einkis!

### Stór breidd

Tað er einki at taka seg aftur í, at tað ongantíð er komið fyri áður, at breiddin hevur verið so stór á einum føroyskum kvinnuliðið, sum hon í løtuni er á KÍ liðnum.

Hesa ferð hevði venjarin valt at seta liðið soleiðis: Anna Müller Jacobsen – Paula Sjóstein, Ragna Andreasen, liðformaður, Paula Mikkelsen – Jensa Sirdal (Una Olsen, 69.), Bára Skaale, Ragnhild Aas, Kristina Eyðbjørnsdóttir, Malena Josephsen, Vivian Bjartalíð – Rannvá Andreasen.

– Eg hugsaði um at gera fleiri útskiftingar, tí vit hava sera góðan bonk, men tað bleiv bara eina ferð til tað. Rútman var góð, sjálvsálitið var í toppi, og serliga í 1. hálvleiki vóru okkara sera sannførandi í nærdystunum, staðfestir ein ógvuliga fegin Jón Harald Poulsen úr Helsingfors.

## Rannvá var heilt á toppinum

**Skarprættarin á oyggjaleikunum gjørdi rættuliga um seg ímóti eysturríkska meistaraliðnum**

EUROPA CUP FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað var gott lag á KÍ kvinnunum mikukvøldið. Dysturin ímóti Landhause úr Eysturríki varð spældur klokkan 19.15. Veðrið var gott, og vøllurin, sum var tætt við bæði olympiska leikvøllin og Finnair leikvøllin, var góður.

Tá KÍ ferðalagið týsdagin kom til Helsingfors, keyptu teir ein guitar, sum mikukvøldið fekk av at vita, inntil spælararnir klokkan hálvgum eitt fóru til songar.

– Nú eru vit sera spentar at spæla ímóti finska meistaraliðnum her úr Helsingfors. Tann dysturin verður fríggjadagin klokkan 19.15. Vit eru púra greiðar yvir, at tað verður sera torført. Vit sóu eina løtu av dystinum, sum tær spældu ímóti Torres úr Italia. Bæði liðini vóru góð. Finska liðið vann 2–1, so talan verður um toppdyst fríggjakvøldið.

Hetta sigur Ragna Andreasen úr Helsingfors. Hon er aftasti maður og liðformaður á KÍ liðnum og sera væl nøgd við KÍ avrikið.

### Hugburðurin gjørdi munin

Í hinum endanum á KÍ liðnum var tvíburðarsysturin hjá liðformanninum. Síðani hon av álvara gjørdi um seg á oyggjaleikunum hevur Rannvá Andreasen drigist við skaðar. Tá hon kom aftur av Isle of Man var tað vinstra bein. Hon varð akkurát klár til finaluna á ólavsøku, men tá stóðst skaði í høgra fótablaði av, og tað var ikki fyrrenn í síðstu dystunum í landskappingini, at Rannvá var før fyri at spæla aftur.

Mikukvøldið vísti hon, at nú er alt í lagi aftur. Rannvá skoraði fyrsta stóra korterið tvey mál:

– Tað fyrra kom eftir innlegg úr vinstru frá Malenu Josephsen og tvørtur um. Eg var støðd uttanfyri brotsteigin, mitt fyri og eitt sindur til høgru. Eg royndi at lyfta í handara síðunetið, og tað var deiliget, at tað eydnaðist so væl.

Og seinna málið?

– Bára Skaale rann eftir einum longum bólti, sum var stungin fram ímillum. Málverjin var fyrri á, men hon kiksaði, tá hon royndi at sparka burtur. Eg fekk fatur á bóltinum og lyfti hann úr 25 metrum og í málið.

Vóru tit á sama støði sum tær?

– Eg haldi, at tað er einki at ivast í, at tær vóru tekniskt væl betri enn vit. Men tær megnaðu ikki at fáa sítt spæl at rigga, tí vit kroystu tær so nógv.

Heldur tú, at tær undirmettu tykkum?

– Okkurt kundi bent á tað. Vit komu upp á pláss á gistingarhúsinum týsdagin klokkan 18. Vit og italska og eysturríkska liðið búgva á sama gistingarhúsi. Tær komu ikki higar fyrrenn eftir midnátt. Tað haldi eg boðar frá, at tær roknaðu við løttum dysti, segði Rannvá Andreasen úr Helsingfors miku kvøldið, og so legði hon afturat:

– Í kvøld er friður í leguni hjá Eysturríki, meðan vit hugna okkum eina løtu.

Hvussu verður ímóti hinum liðunum?

– Fríggjakvøldið skulu vit spæla ímóti Helsingfors. Vit skulu spæla eins væl, sum vit gjørdu mikukvøldið, og so skulu vit vera hepnar. Um tað eydnast, so er kanska møguleiki fyri einum heiðurligum úrsliti, men avrikið mikukvøldið boðaði frá, at tær eru favorittar.